

*Her í samkomuni Carrubbers Close í Edinburgh talaði Dollin um Congo í november og desember 1903. Her hitti hann eisini konuna Linu, sum hann giftist við í mai 1904*



. . GREAT . .

CONGO DEMONSTRATION.

THE

Protest of Christian England

AT THE

ROYAL ALBERT HALL

Friday, November 19, 1909,

at 7.30

Chairman: HIS GRACE

THE ARCHBISHOP OF CANTERBURY.

SPEAKERS:

The Right Rev. THE LORD BISHOP OF LONDON,

Rev. Dr. JOHN CLIFFORD, M.A.

The Right Rev. THE LORD BISHOP OF OXFORD,

Rev. J. SCOTT LIDGETT, M.A., D.D.

Rev. C. SILVESTER HORNE, M.A.

Supported by

The Lord Bishops of Rochester, Birmingham, Manchester, Carlisle, Ely, Newcastle, St. Asaph, Truro, Wakefield, Exeter, Gloucester, Lichfield, Liverpool, Durham;

Dr. CAMPBELL MORGAN, Rev. J. E. RATTENBURY, Dr. MONRO GIBSON, Rev. D. J. HILEY, Rev. SILAS K. HOCKING, Rev. J. H. SHAKESPEARE, Rev. J. D. JONES, Rev. GEO. HOOPER, Rev. THOMAS YATES, Prof. A. E. GARVIE, Dr. HORTON, Rev. F. B. MEYER.

RESERVED SEATS, Price 5/. 2/6 and 1/.

FREE RESERVED SEAT TICKETS

BUSES from all parts of London pass the Door.

*So seint sum í 1909 var skipað fyri mótmælisfundum til frama fyri fólkið í Congo. Her er talan um tað "kristna Ongland", sum stendur aftanfyri. Nógvir talarar og undirskrivarar eru prestar*

## Ætlan um bókaútgávu

**Morel skrivar tann 16. desember 1903 til Dollan:**

"Góði harra Danielson
Eg havi skrivað fylgjandi bræv til Guinnes:

"Eg havi næstan gjørt fotomyndirnar liðnar til mína Congobók, sum eg vóni verður givin út um ikki so langa tíð eftir at almnena rapportin (hjá Casement) kemur út. Eg eri spentur at senda handritið við myndum áðrenn jól.

Hevði tað verið møguligt hjá tygum at strekt tygum til longu nú at latið meg fingið eintak av teimum myndum, sum tygum ætla at almannakunngera í Regions Beyond, og sum tygum ætla at lána mær til West African Mail. Eg lovi sjálvandi, at hesar myndir, sum eg fái, skullu ikki koma fram nakrastaðni, áðrenn tær eru útkomnar í omanfyri nevndu bløðum. Eg vildi verið ótrúliga takksamur, um tygum vildu gjørt mær hendan beinan."

Tygum skilja, at eg ætli ikki at kunngera myndirnar sjálvur. Eg ynski bert at senda tær við mínum manuskripti til hann, sum hjálpir mær við bókini. Hann ynskir at fáa alt áðrenn jól."

**Viðmerking**.
Umrødda bók er helst "King Leopolds Rule in Africa", sum kom út í 1904. Her eru myndir í, sum kunnu vera frá Dollanum.

## Seinna brævið til Morel

**Seinna brævið, sum vit hava frá Dollanum, er skrivað 22. Desember 1903. Tað er eisini sent úr Edinburg. Hann skrivar:**

"Góði Mr. Morel
Sóu tygum í The Daily News tann 21. í h., at (belgisku) myndugleikarnir í Congo fara at senda eina kanningarnevnd til Congo?

Leiðari fyri hesi sera týðandi ferðini er Mayor Malfeyt, sum er settur sum ovasti embætismaður í Congo. Ein Mayor Malfar kom heim frá Congo, tá eg kom í byrjanini av oktober. Um hetta er tann sami persónur, so er hann einki verdur. Hann er ein gummisavnari og træladrívari eins og restin av almennu starvsog handilsmonnum Spurningurin er, um hetta er sami maður?

Hetta er sum at senda ein kriminellan at kanna sína egnu søk, og tí skal koma til at fordøma seg sjálvan.



*Hendan gentan ætlaði at rýma undan harðræðinum, men nú sleppur hon ongan veg*

Hesin Malfeyt hevur verið inni í Congo eina tíð. Um hetta er tann sami persónur, skuldu heimurin fingið at vita um tað.

Tygara
D. J. Danielsen

**Viðmerking**
Eftir at Casement var komin heim gjørdu belgiarar sínar egnu kanningar. Endamálið var at fáa gjørt kanningarnar hjá Casement til einkis.

Espen Wæhle greiðir frá: Justin Malfeyt (1862-1924) var en belgisk offiser, som arbeidet fra Fristaten fra 1891, særlig med logistiske oppgaver heter det (hvilket gjerne kunne ha vært organisering av transport av landets rikdommer). Han ble i 1903 utnevnt til kongelig høykommisær for å ta fatt på de saker som var kommet frem i kritikken mot Congostaten (Casement, Morel etc) - det var han som var ansvarlig for de innfødtes klager overfor staten. Han ble i 1909 vise-guvernør for Belgisk Kongo (så Danielsen har nok rett, han var en systemets mann).

Men seinni í 1904 senda belgiarar eina sendinevnd til Congo, sum fylgir í fótasporunum hjá Casement. Men henda nevndin, sum skuldi gera Casement til einkis, kemur til júst somu niðurstøðu. Hetta mátti tó ikki koma fram í Belgia. Í fyrsta umfari kom fram bert ein sensurerað niðurstøða við ongum broddi. Sjálvar frágreiðingarnar vóru hildnar duldar heilt fram til okkara tíð, tá ið ein íðin belgiari, Jules Marchal, fekk tær fram í ljósið. Hansara áhugaverdu søgu fara vit at koma aftur til.

## Leysir endar

Tað skal sigast, at tað eru nakrir leysir endar í hesum tilfari. Tað hevði verið nógv betri, um øll brøvini hjá Dollanum høvdu verið tøk, men tað eru tey so ikki.

Sambært teirri vitan, sum var um Dollan frammanundan hevði hann úr Congo skrivað til bretsku myndugleikarnar um støðuna í landinum. Hesi brøv fæst neyvan fatur í.

Tað kann væl vera, at tað liggur meira tilfar í skjalasavninum hjá Balolo missiónini í Edinburgh. Men har hava tey verið so illa mannað, at tað hevur ikki enn verið møguligt at leita í dýpdini. Men áðrenn henda søgan verður endað, fáa vit kanska høvi til sjálvir at kanna hetta skjalasavn, har okkurt meira helst er at finna.

Men hinvegin er so mikið komið fram, at frásøgnin sum heild gevur eina hampiliga fullfíggjaða lýsing av Dollanum.

### Komandi partur

Tað verða tríggir partar afturat í hesi røð. Her verður fyrst og fremst greitt frá virkinum hjá Daniel J. Danielsen eftir, at hann er komin til Føroyar, og til hann doyr í 1916.

Føroyar eru við hesi greinarøð blivnar ein partur av søguni hjá Norðanlondum í Congo. Henni fara vit eisini at hava tilfar umframt annað áhugavert tilfar.

Sosialurin